


# Listin í hásætið í eina viku

**Einaferð um árið verður ein vika tikin úr tímatalvuni á Norðskála-Oyrar Skúla. Øll vanlig undirvísing verður løgd á hillina, og listar-eginleikarnir verða drignir fram í staðin.**

LOPPUGRAS
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tá kann alt sum eitur rokning, landalæra, søga ella danskt bíða, tí tá snýr seg um sang, tónleik, dans, tekning og máling. Sutt sagt, so verður tað listarliga barnið sett í hásætið hesa vikuna.

### Afturvendandia tiltak

– Evnisvikan er eitt árligt afturvendandi tiltak. Við evnisvikuna royna vit náa tað heila barnið, og tað gera vit við listini, sum er tónleikur og máling. Vit arbeiða út frá ymsum høvuðsevnum, og í ár var evnið Loppugras. Óli Jákup Joensen er fyrsti lærari á Norðskála-Oyrar Skúla, og tað er hann, sum greiðir frá.

Áður hevur skúlin havt Grindavísuna og H.C. Andersen sum høvuðsevni í evnisvikuni. Í fjør var evnið Aleksandur Kristiansen, og í ár fall valið so á Loppugras, eitt yrkingasavn eftir Sólrun Michelsen.

### Allar listagreinar umboðaðar

– Vit leggja okkum altíð eftir at velja evnið, har allar listargreinar kunnu koma upp í part. Næmingarnir skulu kunna spæla tónleik og syngja eftir teimum evnum vit velja. Í so máta er Loppugras eitt einastandi tiltak, har tekstirnir eru lættir og ljósir, umframt at løgini eru sera góð og rigga væl til. Eisini málingin og tekningin er við íblástri úr Loppugras, sigur Óli Jákup Joensen, sum er sera væl nøgdur við evnisvikuna, sum var alla farnu viku og endaði við, at næmingarnir leygardagin vístu fram tað, teir høvdu fingið burtur úr. Har var bæði spælt, sungið og dansað, og meðan ein steðgur var, kundu øll ganga runt og hyggja at tekningum og málningum frá vikuni.

### Bar a positivt

Tað er ikki óvanligt, at skúlar seta dagar av til eitt hvørt annað enn vanligu undirvísingina, og tímatalvan harvið má víkja, men ein heil vika er nógv í einum skúlaárið. Kortini metir Óli Jákup Joensen, at hetta ikki gongur út yvir frálæruna hjá tí einstaka næminginum. - Nei, tað haldi ikki. Lesingin vísir seg at vera tað, sum krevur at vera í gongd alla tíðina, og tí byrjar hvør dagur í evnisvikuni við, at næmingarnir lesa í ein hálvan tíma. Yngru flokkarnir hava fyri, júst sum vanligt, meðan eldur flokkarnir hava frílesing, og soleiðis verður tað hildið við líka.

– Eg haldi, at øll kring skúlan eru glað fyri eina viku sum vit júst hava havt, og hugurin til vanligu skúlagongdina vísir seg eisini at vera betri aftaná, so hetta er nakað vit eru ógvuliga glað fyri, sigur Óli Jákup Joensen, fyrsti lærari á Norðskála-Oyrar Skúla.






## Serkøn hjálp útifrá

Fyri at fáa sum mest møguligt burturúr evnisvikuni, hevði skúlin valt at fáa serkøna hjálp úti frá. Arbeitt varð nógv við dansi, og her høvdu tey fingið Hildibjørg Sólsker av Oyrarbakka at hjálpa til og leggja lag á. Hildibjørg undirvísir nógv í dansi, og seinastu tíðina er tað serliga tann væl umtókti line-dansurin, sum hevur fylgt nógv.

Til tónleikin hevði skúlin eisini fingið sær serkøna, fyri ikki at siga professionella hjálp, í Ólavi Olsen. Hetta eru tey á skúlanum ómetaliga glað fyri.

Men at fáa fólk úti frá og inn á skúlan er ikki ókeypis, og fyri at figgja tað, hevur skúlin brúkt vikartímar tey eiga. – Tað krevur, at vit brúka ómetaliga fáar vikartímar ígjøgnum árið annars, og at lærararnir eru lagaligir mótvegis skúlanum, og tað seg tíbetur at rigga væl, sigur Óli Jákup Joensen.

**RWD**



